**Tíðindaskriv frá teimum politisku feløgunum í Sandoyar sýslu**

# Tey Politisku feløgini í Sandoyar Sýðslu

Eftir at Magni Laksáfoss hevur úttalað seg um undirsjóvartunnilin til Sandoynna, er veruligur ótti komin á fólk her suðuri, og tosað verður nógv um, um nú tunnilin kemur ella ikki.

At tunnilin kemur, er nokk sikkurt, men eftir hetta úttalilsið hjá Magna, er spurningurn nú, nær kemur hann?

Formenninir í teimum politisku nevndunum hava verið saman á fundi og eru samdir í, at Sandoyggin, ja øll suðurleiðin, hevur ikki ráð at bíða. Allir eru samdir í, at her skuldi standast saman og fara út sum ein maður. Og seta vit sum treyt, at tunnil kemur undir Skopunarfjørð. Tosað var um, hvat man vil í Føroyum. Jú laga manni, so verður tosað um at miðsavna sum mest, og gera tað lættari hjá vinnulívinum og tí meiniga manninum at koma aftur og fram, men er hettar nú bara gladandi fyri nøkur øki í Føroyum.
Er tað ikki meiningsleyst at bíða við okkum á Sandoynni? Er tað ikki ein treyt fyri samfelagið, at tað næsta á skránni er ein tunnil suður til Sandoynna, so at ein komandi suðurleið kann gerast verðuleiki. Hvar tunnilin skal fara niður og koma upp eru ymiskar meiningar komnar fram um. Sama er galdandi við fíggingini av tunnlinum. Tað seinasta nýggja er, at Skálafjarðatunnilin skal fíggja Sandoyartunnilin.

Hvat ið er tann besta loysnin, skulu vit ikki gera okkum Harrar yvir. Tað mugu teir, sum kalla seg teir kønu á økinum, finna út av.

Rætt er, at ikki er tað heilt stóra vinnulívið í Sandoynni, men skal tað vinnulív sum er, ja alt lív yvirhøvir, hava lívið lagað og kunna menna seg, so skal tunnil koma til oynna. Sum nú er, eru vit ikki kappingfør við vinnulívið á "fastlandinum". Vit megna ikki at fylgja við tí stóru framgongd, sum er á øllum økjum.

T. d so skal ein timburmeistari her á oynni, tá hann skal geva eitt tilboð upp á eina uppgávu norðanfjørðs taka bæði ta tíð og kostnaðin tað tekur at sigla um fjørðin, við í tilboðið. Av tí sama er hann, sum oftast, við skerdan lut. Sama er við okkara flakavirkjum. Tá fiskur skal fáast til oynna, tí ikki eru tað nógv skip, sum landa á Sandi, so má fiskurin fraktast við báti um fjørðin, og er hettar ein meiri kostnaður fyri virkini. Sama ger seg galdandi, tá fiskurin skal av oynni aftur.

Hyggur man eftir tí røring, sum er komin í oynna, bara tí at tosið er komið fram um tunnil, so sæst, at t. d. í Skopun, Skálavík og á Sandi, eru útstykkingar farnar fram. Og longu eru fleiri hús reist og øll hini grundstykkini eru umbiðin. Hettar eru mest fólk, sum hava tilknýti til bygdinar, men eisini er onkur, sum ikki tímir at bíða, til tey fáa játtan til at seta búgv í miðstaðarøkinum.

Vit ivast ikki í, at um tunnil kom, so flutu nógv fólk suður at búgva, tí okkum kunnugt, so er bíðilistin, eftur grundstykki í Havnini rímilga langur. Tað kann ikki vera so torført at ímynda sær tann positiva íblástur tað hevði verið fyri oynna og longur suðureftur, um tunnilin kom. Spyrji bara vágafólk og tey í norðoyggjum, hvat tey halda um, áðrenn og eftir undirsjóvartunnilin.

# Um trygdina undir midnáttarsanginum

**TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**
Tíðindaskriv

Heitt verður á fólk um ikki at fara inn í trongan kring Tinghúsvøllin við smábørnum annaðhvørt til gongu ella í barnavogni, meðan midnáttarsangurin er á ólavsøku. Eisini verða fólk biðin um so vítt gjørligt at parkera bilarnar so langt frá miðbýnum, sum til ber.

Tað savnast rættiliga nógv fólk á Vaglinum og økinum kring Vaglið til midnáttarsangin ólavsøkukvøld. Eisini fólk, sum koma við barnavogni og smáum børnum, ið eru til gongu ella verða borin.

Hetta kann vera rættiliga óheppið, tí so trongligt og nógv trokan er á økinum hesa løtuna. Eisini eftir sangin, meðan dansað verður.

Tórshavnar kommuna heitir staðiliga á fólk, sum koma til hesa stóru samkomuna og hava børn við, um at bera so í bandi, at tey standa næst Gamla Bókhandli. Miðað verður ímóti, at økið undir Bókhandlinum, har sum Frelsunarherurin hevur útimøti beint undan midnáttarsanginum, í størst møguligan mun verður tøkt til fólk við smáum børnum. Àheitanin er samstundis á onnur, sum koma til tiltakið, um at hava hetta í huga. Tí óhugsandi er ikki, at børn ótolnast, og tá skulu tey helst hava ein møguleika at sleppa burtur.

**Bilparkeringin**

Nógv fólk fara í býin við bili til hetta tiltakið. Tað kann eisini í fleiri førum vera neyðugt. Serliga hjá fólki, ið býr í nýggju búsetingunum í Hoyvík ella aðrastaðni, eins og bygdarfólk, sum koma á ólavsøku, sjálvsagt hava bil við.

Tórshavnar kommuna heitir á fólk, um at royna at finna parkeringpláss so langt frá miðbýnum, sum gjørligt. Nógv parkeringsøki eru, ið væl ber til at ganga frá oman í miðbýin. Úr Gundadali er ikki so øgiliga langt. Heldur ikki av Hálsi. Av Trapputrøðini er styttri, eins og av Glaðsheyggi ella av Kongabrúnni. Eisini eru parkeringspláss uttan fyri Skansan. Nýggja parkeringplássið við endan av Mortansstovubrekkuni er best atkomiligt uttaneftir úr t.d. J.Paturssonargøtu ella av



Dalavegnum. Og so er sjálvandi Skálatrøð eftir. Men ynskiligt hevði verið, um tey plássini vórðu sum minst nýtt til bilparkering, meðan so nógv fólk er á ferð í miðbýnum.

Víst verður til lýsingar í bløðunum og á www. torshavn.fo har síggjast kann, hvussu ferðslan er skipað á ólavsøku.

**TÍÐINDASKRIV frá Listafelagnum**

# SLÓARBLÓÐ - Ólavssøkuframsýningin 2007 í Listasavninum

Slóarblóð er Ólavssøkuframsýningin hjá Listafelagnum í ár. Slóin er beinið inni í horninum á seyði og øðrum kríatúrum, beinið, sum hornið situr uttaná. Myndin av blóðinum inn í slóini ímyndar tað, sum rørir seg hjá teimum, sum kanska fara at mynda listina her á landi í morgin og ovurmorgin.

Til at geva framsýningini rætta huglagið verður tónleikaframførsla við Guðrið Hansdóttir ólavssøkuaftan kl. 16.00.

Nýtt er, at luttøkan er avmarkað til tey millum 18 og 30. Undirtøkan hevur verið góð, eini 100 verk eru innkomin, og 56 verk eru vald burturúr. Listafólkini eru 18 í tali, javnt býtt millum kvinnur og menn, sum eru eru millum 19 og 30 ára gomul.

Verkini eru olju- og akrylmálningar, akvarellir, leirlist, prentlist, foto og filmslist.

- Listafelagið skipaði í 1948 fyri fyrstu Ólavsøkuframsýningini, og síðani hevur hon verið fastur táttur á ólavsøkuskránni, nakrar fáar ferðir í 1950'ár unum undantiknar. Mong eru tey, sum fingu fingu ta fyrstu listaligu viðurkenningina á framsýningini, sigur Listafelagið í tíðindaskrivi.

Tann siðin vil Listafelagið fegið varðveita, men á annan hátt. Tí er framsýningin broytt í ár. Til at skipa fyri heitti Listafelagið á teir báðar Jóannes Lamhauge og Heiðrik á Heygum, sum fúsir tóku av, og teir hava verið stak arbeiðssamir.

Stóri salurin í Listasavninum, sum er upprunaligi Listaskálin, er málaður og innrættaður serliga til Ólavssøkuframsýningina. Hon letur upp ólavssøkuaftan kl. 14 og endar 12. august.

**Ólavssøkuframsýningin er í Listasavninum í Gundadali og er opin soleiðis:**

Ólavssøkuaftan kl. 14-20 – Gevið gætur: Guðrið Hansdóttir framførir kl. 16.

Ólavssøkukaftan 14-20

Síðani fram til 12. august í vanligu upplatingartíðini hjá Listasavninum.

Atgongumerki: 50 kr.

## Rætting

Í samrøðu við Chr. Nagata í Ólavsøkublaðnum er tíverri komið at standa, eftir at greinin hevur verið gjøgnum fleiri lið í prentviðgerðini, at hann keypti bumbuflogfar til »marknaðarføroying«. Hetta er ein misskiljing. Greinin snýr seg í høvuðsheitum um marknaðarføring, og tað var hetta, flogfarið var ætlað til.

**Blaðm.**